VESTMANNA KOMMUNA

# KUNNGERÐ

**um broytingar í byggisamtyktini fyri Vestmanna Kommunu**

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, seinast broytt 13. mai 1992, um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum boðað frá, at Vestmanna Bygdarráð á fundi 1. mars 2007 hevur samtykt at gera niðanfyri standandi broyting í byggisamtyktini fyri Vestmanna.

**Nýtt alment øki á Grønanesi**

Í sambandi við samtykt um at staðseta ætlaða røktarheimið á Grønanesi verður partur av verandi havnaøki broytt til øki til alment endamál.

Broytingin umfatar hesar matriklar ella partar av teimum: 36c, 42b og litra "b".

Broytingarnar liggja frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni

**í vanligari skrivstovutíð**
**frá 28. mars til 18. apríl 2007**
**– báðir dagar íroknaðir.**

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, sum skulu vera skrivlig, skulu verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi 28. juni 2007.

VESTMANNA KOMMUNA

Lesið Sosialin -so eru tit við!

MIÐVÁGS KOMMUNA

# KUNNGERÐ

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. Mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður við hesum gjørt kunnugt, at Miðvágs bygdaráð á fundi tann 20/03-2007 samtykti at broyta býarplanin fyri Miðvágs kommunu soleiðis, at eitt øki Inni á Støð í Miðvági verður broytt til A1-øki (miðstaðarendamál serstøk byggisamtykt) og F-øki (alment frítíðarøki).

Broytingin er hendan: Partur av matr. nr. 244a og partur av matr. nr. 245 verða broytt frá F-øki (alment frítíðarøki) til A1-øki (miðstaðarendamál serstøk byggisamtykt). Matr. nr. 344d, 233d, 249e, 233e, partur av matr. nr. 349b, 233f, 251m, 358, 359, 136b, 233g, 137d, 233h, 249d og 251l verða broytt frá G-øki (neyst) til A1-øki (miðstaðarendamál serstøk byggisamtykt). Matr. nr. 188c, 26c, 142b, 244c, 23, 170 og 251n verða broytt frá A-øki (miðstaðarendamál) til A-1 øki (miðstaðarendamál serstøk byggisamtykt). Matr. nr. 233i verður broytt frá D-øki (havnarøki) til F-øki (alment frítíðarøki).

Kort, sum vísir broytingina, liggur frammi til alment eftirlit á bygdaráðsskrivstovuni í arbeiðstíðini frá mánadegnum 26. mars til fríggjadagin 16. apríl - 2007 báðir dagar íroknaðir.

Møgulig broytingaruppskot ella mótmæli skulu skrivliga verða bygdaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. juni 2007.

*Miðvágs kommuna*

Føroya Skúlabókagrunnur

# STARVSLÝSING

Eitt starv sum ritstjóri verður lýst leyst í Føroya Skúlabókagrunni til setanar sum skjótast.

Starvið fevnir í høvuðsheitum um praktiskt útgávuvirksemi, ráðgeving og vegleiðing í sambandi við at geva út fjølbroyttar undirvísingarmiðlar til føroyska skúlaverkið. Ein partur av starvinum verður at kunna seg við tørv á tíðarbærum undirvísingarmiðlum, lærugreinum og undirvísingarevnum í byrjanarundirvísingini í fólkaskúlanum. Upplæring kann vera neyðug.

Ritstjórarnir á Skúlabókagrunninum eru eitt toymi, sum arbeiðir saman um at útvega so nógvar og so dygdargóðar undirvísingarmiðlar sum gjørligt til alt tað føroyska skúlaverkið. Útlit eru til, at byrjanarfrálæran fer at verða raðfest hægri, og tað er umráðandi, at undirvísingarmiðlarnir eru ein partur av hesari raðfesting. Vilt tú vera við til at menna fólkaskúlan og serstakliga tryggja, at byrjanarfrálæran fær góðar umstøður, so eru nógvar áhugaverdar uppgávur at fara í holt við.

**Førleikar**

Til starvið krevst útbúgving sum fólkaskúlalærari, í minsta lagi 5 ára undirvísingarroyndir, dyggur fakligur førleiki, tá um byrjanarundirvísing ræður, og hollur kunnleiki í føroyskum

Løn og setanartreytir

Løn og setanartreytir verða eftir sáttmála við Føroya Lærarafelag og við góðkenning Fíggjarmálaráðsins. Royndartíðin er eitt ár.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera Skúlabókagrunninum í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 16. apríl 2007.

Gjølligari upplýsingar um starvið fáast frá Helenu Dam á Neystabø, tlf. 31 61 00

*Tórshavn 19. mars 2007*

**Føroya Skúlabókagrunnur**
Lützenstrøð 4
FO-100 Tórshavn

Vit selja nýggja bátar í ymiskum støddum og sløgum m.a. hendan



ring og hoyr nærri, eisini um aðrar møguleikar

**HP.MARINE - SP/F RÚNAR**
Túnagøta 1 • 600 Saltangará
tlf. 219450 • Fax 449191 • hpe@kallnet.fo



**HARRAKLIPP**
Í VÁGSBOTNI

*Frisørsveinur søkist til hálva tíð.*

*Áhugaði kunna venda sær til 31 87 57 ella 22 35 95*

# Møtlar

Vit hava møtlar. Ring og hoyr nærri.

**Tlf 21 55 99 / 21 75 99**

# Sjúkravikarur søkist

Søkt verður eftir sjúkravikari til barnaansingina í Leirvík.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsing um starvið fæst við at venda sær til leiðaran tlf. 743325

Skrivlig umsókn skal sendast til Leirvíkar kommunu innan 19.04.07.

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42 · 520 Leirvík

Lesið Sosialin - so eru tit við